Álit

í

løgtingsmáli nr. 120/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung (Hækka aldurin upp til 18 ár)

Sirið Stenberg og Hervør Pálsdóttir hava vegna Tjóðveldi lagt málið fram tann 5. mars 2021, og eftir 1. viðgerð tann 11. mars 2021 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 6. og 8. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismann í heilsumálum saman við Gigni, Barna- og ungdómspsykiatriini og umboð fyri arbeiðsbólkin, sum gjørdi álitið "Heildarætlan fyri sálarliga heilsu í Føroyum" og Jenis av Rana, landsstýrismann í mentamálum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Uni Rasmussen, Annika Olsen, Rósa Samuelsen og Erhard Joensen) hevur hesar viðmerkingar:

Tað er komið fram, at stórar avbjóðingar eru á Gigni, sum hava staðið við síðan 2017. Tað snýr seg um lønartrætu, sum alneyðugt er at loysa sum skjótast fyri at fáa stovnin at virka optimalt. Í hesum døgum verður lýst eftir nýggjum fakligum stjóra til Gigni, og tí er ikki ráðiligt at seta nakra nýggja fyriskipan afturat í verk, fyrr enn viðurskiftini á stovninum aftur eru støðug.

Í álitinum um sálarheilsu eru fleiri ítøkilig átøk nevnd, og hetta uppskotið er tikið úr einum av tilmælunum, har mælt verður til, at Gigni eigur sum frá líður at varðveita tilknýtið til børnini og teirra avvarðandi øll árini frá føðing og til barnið er 18 ár. Meirilutin er samdur í, at hendan broytingin er av stórum týdningi, men landsstýrismaðurin hevur upplýst, at tá nýggj leiðsla er sett á Gigni, verður skipanin endurskoðað við atliti til heildarætlanina um sálarheilsu. Tá verður raðfest, hvørjar broytingar møguliga skulu gerast, og hvørji átøk skulu hava hægstu raðfesting og stigvíst setast í verk.

Heilsufrøðingar koma inn í øll heim í Føroyum, eftir at foreldur hava fingið barn, til tey eru 18 mánaðir gomul, men heilsufrøðingar síggja ikki børnini aftur, fyrr enn tey eru farin í skúla. Í hesum tíðarbili verða børn tó kannað hjá kommunulækna eina ferð um árið, til tey skulu í skúla.

Peningur er nú játtaður til at menna tilboð til børn upp til 5 ár. Tilknýtið hjá familjuni til heilsufrøðing, ið kann veita stuðul og ráðgeving, hevur sera stóran týdning og skal ikki undirmetast. Har mettur tørvur er staðfestur, eiga familjur við avbjóðingum at fáa fleiri vitjanir frá heilsufrøðingi til familjuráðgeving, til barnið fer í skúla.

Landsstýrismaðurin hevur eisini boðað frá, at ætlanin er at seta fýra heilsufrøðingar afturat, og ætlanin er eisini at uppraðfesta útbúgvingina soleiðis, at allir heilsufrøðingar verða uppskúlaðir til eisini at kunna veita familjuráðgeving, eins og onnur Norðurlond hava gjørt.

Ein stórur og týdningarmikil partur av arbeiðinum hjá heilsufrøðingunum eigur at snúgva seg um at stuðla undir at styrkja foreldraleiklutin, eisini hjá fosturforeldrum og nærsambondum í familjuni, og eingin ivi er um, at tørvur er á hesari tænastuni. Tørvurin sær út til at fara at vaksa í framtíðini, um tað ikki verður sett tíðliga inn á hesum øki. Eingin almenn skipan veitir hesa tænastu, men barnaverndartænasturnar keypa í ein ávísan mun tænastuna frá fólki, sum hava hesa serútbúgving, so førleikin finst longu í landinum.

Fyribyrging og heilsufremjan eru lyklaorð fyri at tryggja ein góðan og tryggan uppvøkstur. Fleiri kanningar eru gjørdar, sum staðfesta at sálarheilsan hjá børnum og ungum er ikki góð nokk. Verður góð og røtt hjálp veitt beinanvegin, tryggja vit eitt gott barna- og ungdómslív og forða fyri óneyðugum sálarligum løstum.

Kannað eigur eisini at verða, um tørvur er á, at heilsufrøðingar skulu hava tilknýti til dagstovnar. Í samstarvinum við foreldur og námsfrøðiligu ráðgevingina hjá kommununum hevði tað verið skjótari at sett sjóneykuna á avbjóðingarnar og harvið fingið skjótari atgongd til Sernám ella psykiatrisku deild.

Í fleiri førum, tá børn hava fingið staðfest eina psykiatriska diagnosu, hava foreldur brúk fyri at fáa stuðul og ráðgeving. Høvdu foreldrini eisini havt møguleikan at fingið familjuráðgeving frá heilsufrøðingi, hevði tað fyribyrgt, at trupulleikin bleiv ov stórur, og í ávísan mun eisini fyribyrgt, at tað seinni endaði við einum barnaverndarmáli. Tá børn og familjur hava brúk fyri hjálp frá barnaverndartænastuni, hevði hendan skipanin eisini havt við sær, at familjan í nógv størri mun fekk hjálpina inn í heimið.

Vísandi til, at landsstýrismaðurin hevur boðað frá, at hann, tá viðurskiftini á Gigni eru støðug aftur, fer undir at enduskoða skipanina við heilsufrøðingum við atliti til heildarætlanina um sálarheilsu og fer at leggja uppskot um hetta fyri Løgtingið, tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Sirið Stenberg, Eyðgunn Samuelsen og Hervør Pálsdóttir) metir málið hava stóran týdning fyri at styrkja tað fyribyrgjandi arbeiðið millum ung fólk.

Minnilutin metir tað ikki vera haldgóða grundgeving at fella uppskotið orsakað av eini lønarósemju um flokking av varaleiðarsstarvinum í Gigni. Hetta uppskotið skal koma í gildi 1. januar 2022, og vónandi er ein loysn funnin til ta tíð.

Í dag fevnir tænastan hjá Gigni um børn og familjur, øll pinkubørn, ein part av smábørnum og øll skúlabørn. Tá ið undirvísingarskyldan heldur uppat aftan á 9. flokk í fólkaskúlanum, heldur eisini tænastan hjá Gigni uppat. Tey ungu eru tá um 15-16 ára aldur.

Seinnu árini er peningur eisini játtaður til at styrkja arbeiðið hjá heilsufrøðingunum við smábarnafamiljum, sum eru familjur við børnum millum 2 og 5 ár. Nevndarviðgerðin hevur vist, at tað hevði verið skilagott at styrkt smábarnaarbeiðið í Gigni enn meira. Hesin tekur minnilutin undir við, men sær onga andsøgn í eisini at samtykkja hetta uppskotið. Heldur tvørturímóti.

Lógin um fyribyrgjandi heilsutænastur heimilar eisini heilsufrøðingunum at arbeiða á dagstovnaøkinum, og hetta kann fáast í lag við at raðfesta økið fíggjarliga.

Endamálið við hesum uppskoti er at økja um tænastuna hjá Gigni at røkka børnum upp til 18 ára aldur. Við hesum hevði borið til at lagt størri dent á fyribyrging og heilsufremjan og at arbeiða við trivnaði millum ung.

Tað er eingin loyna, at eitt nú sálarheilsutrupulleikar og vánaligur trivnaður fyllir meira og meira millum ung. Tað finst í dag onki skipað tilboð til henda aldursbólk. Somuleiðis hevur aldursbólkurin tørv á eitt nú vegleiðing um heilsufremjan, vaksnamannalív, gitnaðarfyribyrging, seksualundirvísing, kost, rúsevnir og rúsdrekka, royking og mangt annað. Hetta eru arbeiðsøki, sum heilsufrøðingar kunnu røkja.

Í sálarheilsuætlanini "Heildarætlan um sálarheilsu í Føroyum" frá 2018 varð mælt til at víðka arbeiðið hjá Gigni til at fevna um ung upp til 18 ár. Undir yvirskriftini "Børnini skulu hava bestu fortreytir fyri góðari sálarheilsu" varð víst á, at heilsufrøðingar koma so at siga í øll heim við børnum í Føroyum og síggja øll skúlabørn. Heilsufrøðingar hava harvið eitt serstakt samband við føroysku børnini og familjur teirra, og eru tí lyklapersónar, tá tað snýr seg um sálarheilsuna hjá børnum í øllum aldri. Í framhaldi av hesum mælti arbeiðsbólkurin til, at Gigni sum frá líður eigur at varðveita sítt tilknýti til børnini og teirra avvarðandi øll árini frá føðing til barnið er 18 ár.

Vit eiga at leggja okkum eftir at varnast mistrivnað hjá børnum so tíðliga sum møguligt og seta inn skjótast gjørligt við teimum røttu fyriskipanunum. Fyri hitt einstaka barnið og familjuna er hetta av ovurstórum týdningi fyri møguleikarnar at fáa eitt gott lív. Somuleiðis vísa kanningar eisini greitt, at størsti fíggjarligi samfelagsligi vinningurin fæst við at gera íløgur í børnini og teirra menning, samanborið við at gera íløgur í menningina seinni í lívinum.

Skjalprógvað er, at trupulleikar við mistrivnaði í longri tíð kunnu elva til sálarsjúku. Somuleiðis vita vit, at fólk, sum hava sálarligar avbjóðingar sum vaksin, í stóran mun hava havt slíkar avbjóðingar sum ung. Hetta krevur, at vit arbeiða skipað við tvørfakligum og tvørgeiraligum átøkum børnunum at frama.

Flestu børn og ung í Føroyum trívast og liva eitt aldurssvarandi og virkið lív við luttøku í skúla og frítíðarítrivum. Tey hava góð vinfólk og gevandi familjusambond. Tó eru greiðar ábendingar um, at talið økist á børnum og ungum, ið ikki trívast í gerandisdegnum vegna sálarligar trupulleikar. Ávísingarnar til Barna-og ungdómspsykiatriina hava seinastu árini verið støðugt vaksandi, og hagtøl um heilivágsnýtsluna avdúka, at alt fleiri ung (15-24 ár) fáa antidepressiva.

Almannaverkið hevur víst á sálarligar líðingar sum størstu orsøkina til óarbeiðsføri hjá ungum føroyingum. Sernám hevur víst á, at ein vaksandi bólkur av børnum og ungum megna ikki skúlan vegna sálarligar avbjóðingar, aloftast angist. Somuleiðis vísa skrásetingar hjá heilsufrøðingum, at umleið fjórði hvør næmingur í fólkaskúlanum livir við trupulleikum ella avbjóðingum, ið kunna ávirka teirra sálarligu heilsu.

Eisini kanningar frá Fólkaheilsuráðnum siga, at tað serliga eru tey ungu vaksnu, sum stríðast við sálarligar avbjóðingar. Hjá teimum yngru vísir granskingin, at millum 20 og 40 % longu áðrenn 14 ára aldur hava verið merkt av álvarsligum sálarligum avbjóðingum. Hetta lýsir ein tørv hjá børnum og ungum, ið tykist vera vaksandi, hóast tølini eisini skulu tulkast við varsemi. Hetta kann partvíst hanga saman við, at sjóneykan í størri mun nú enn fyrr verður sett á, hvussu børn og ung trívast.

Niðurstøðan hjá arbeiðsbólkinum, sum gjørdi álitið um sálarheilsu, var eisini, at tað eru børn og ung, ið stríðast við sálarligar avbjóðingar, og at tey, sum er, ikki altíð fáa neyðugu hjálpina. Um vit skulu venda gongdini er neyðugt, at vit gera íløgur í at veita skjóta hjálp.

Góð sálarheilsa er ein avgerandi fortreyt fyri menning og læring hjá børnum og ungum, útbúgving og seinni at fáa fótafesti á arbeiðsmarknaðinum. Tí er týdningarmikið, at vit gera nakað munagott fyri at lyfta sálarligu heilsuna hjá børnum og ungum, sum ikki trívast. Vit mugu tryggja okkum, at tey fáa hjálp rættstundis, so sálarliga heilsustøðan ikki versnar.

Hetta uppskot er ein liður í at seta í verk tilmælini í sálarheilsuætlanini.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 23. apríl 2021

Uni Rasmussen formaður	Sirið Stenberg næstformaður	Eyðgunn Samuelsen
Hervør Pálsdóttir	Rósa Samuelsen	Annika Olsen
	Erhard Joensen	